# eykjavíkar


Gyrðir Elíasson

**Gyrðir Elíasson var føddur í 1961. Ættfólk hansara kemur av Eystfirðum í Íslandi, men hann vaks upp í Sauðárkróki á Norðurlandinum, haðani hann varð studentur. Eina tíð búði hann vestanfyri, á Borgarnesi og Akranesi, seinni í Reykjavík.**

Næstan alt sítt vaksnamanna lív hevur hann verið fulltíðar rithøvundur, hevur givið út mong yrkingasøvn, skaldsøgur og stuttsøgusøvn. Gyrðir Elíasson er ein av teimum mest virdu rithøvundunum í sínum ættarliði og er virðisløntur fyri verk síni. Hann er íðin týðari, hevur týtt nógvar bøkur um og eftir amerikanska upprunafólkið, og hann hevur týtt tríggjar skaldsøgur eftir Richard Brautigan.


*Donald S. Murray*

**Donald S. Murray, føddur í 1956, er ættaður úr Ness, norðast á oynni Lewis í Suðuroyggjum, t.e. Hebridunum, sum fólkið haðani eisini nevna Western Isles (Vesturoyggjar), av tí at tær liggja vestur úr Norðurskotlandi.**

Donald, hvørs móðurmál er skotsk-gæliskt, hevur undirvíst í mong ár, bæði í Suðuroyggjum/ Hebridunum og í seinastuni í Hetlandi. Skrivligu avrik hansara eru prentað ymsastaðni. Yrking hansara og prosa, blaðmannaskriving og ørindi hava staðið í ymiskum ritum, til dømis New Writing Scotland, New Shetlander, Edinburgh Review, Poetry Scotland, West Highland Free Press, The Herald og The Stornoway Gazette.
Nakrar av søgum hansara eru komnar út í stuttsøgusavninum Special Deliverance (1998). Eisini hevur hann skrivað rit um oyggjafólkini, líka úr Hetlandi suður ímóti Írlandi, West Coasters og Between Minch And Muckle Flugga – henda seinna bókin lýsir bondini millum Suðuroyggja og Hetlands, hvussu líkt lívið á báðum oyggjaflokkunum hevur verið. Komandi bók hansara, Speak To Us Catriona, byggir á munnligar arvmentir av heimaoyggj hansara, Lewis í Suðuroyggjum.


*Jen Hadfield*

**Jen Hadfield, f. 1978 (nevnir seg stundum Rogue Seeds) man vera tann mest eksperimenterandi av teimum høvundunum, sum bera fram í Norðurlandahúsinum. Hennara fyrsta yrkingasavn "Almanacs" (2005) var skrivað í Hetlandi og í Suðuroyggjum í 2002. Sjálv lýsir hon yrkingasavnið m. a. soleiðis:**

"Almanacs is about lists, rules and archetypes and what they don´t account for ... The central sequence, Lorelei´s Lore, is a road movie in poems, set in the north of Scotland: Ultima Thule, hijacked by elusive sirens and Harrier jets. Ghosty´s driving: Ghosty who´s given up on everything except Skerryman and The Road, and Skerryman himself, the patron saint of bad weather and absence-makes-the-heart-grow-fonder. Lorelei´s Lore is obsessed with yearning, like the two seas separated by Shetland: metres apart / and desperate for each other."
Árini undanfarnu hevur Jen Hadfield, sum tá hevur nevnt seg Rogue Seeds, millum annað gjørt sjáldsamar, handgjørdar listbøkur og yrkingalíki. Hon hevur eisini arbeitt við ljósmyndum og hevur verið útgávuráðgevi m.a. hjá Chapman Publishing, og hon er fleiri ferðir virðislønt fyri síni listarligu avrik.


*Lise Sinclair*

**Lise Sinclair býr og er uppvaksin á Fair Isle, teirri fjarskotnu oynni miðskeiðis millum Hetlands og Orknoya, har sum hon var fødd í 1971. Hon slepti síni góðu starvsleið í føgrum listum í Glasgow School of Art fyri at hjálpa manni sínum Ian Best, sum er bátasmiður. Tey eiga fýra børn saman.**

Lise er sangari og tónleikari, hon hevur spælt inn, givið út og staðið víða hvar á palli, eitt nú í Reykjavík, Noregi, Washington DC og í Glasgow. Seinastu árini er hon farin undir at skriva bæði yrkingar og sangir, og hon hevur komponerað og framført eina suitu fyri cello, hørpu og rødd, við støði í hetlendskari yrking. Yrkingarnar hjá henni hava staðið í The New Shetlander og Pull of the Moon.